# Jacob Danielsen 85 ár

Hósdagin 14. august verður ein kendur útróðrarmaður í Porkeri, Jacob Danielsen, 85 ár.

Foreldrini hjá honum vóru Johanna f. Sørensen og Dániel Peter Ludvig Danielsen, vanliga nevndur Bakkin, bæði úr Porkeri. Bakkin var eisini kendur sum útróðrarmaður. Landsstýrið fór mitt í undanfarnu øld at geva fiskimonnum heiðursmerki. Okkurt ár var varð Bakkin heiðraður av landsstýrinum fyri stóra og góða veiðu sum útróðrarmaður.

Tað munnu vera fáir føroyingar, sum hava roynt sjólívið so nógv sum Jacob.

Fyrstu ferð, hann fór til sjós, var í 1939 við "Gracie", sum Jákup Nielsen í Nólsoy førdi. Í 1940 fóru pápi hansara og hann við Irex av Tvøroyri við Pola Poulsen, á Høvdanum í Porkeri, sum skipara.

Undir krígnum róði Jacob út saman við pápa sínum, og tað gekk sera væl..

Summarið 1945 var Jacob við Mariu úr Vági, sum Tummas við Kráir átti. Pedan hjá Hendrikki var skipari. Teir vóru á ísfiskaveiðu og landaðu í Aberdeen.

Í 1947 keyptu porkeningar trolaran Høvdaberg. Jacob fór við honum og aftur við Pola sum skipara. Poli doyði annars sjálvur fjórði í 1952 við torvbátinum í Porkeri.

Í 1956 fór Jacob aftur til skips við City of Norwich við kenda skiparanum Andreas Mikkelsen.

Tá kom íslandstíðin, tá ið nógvir føroyingar fóru til Íslands at fiska og arbeiða. Jacob fór saman við øðrum til Íslands í 1956. Hann var vanliga við íslendskum trolarum um summarið og var heima um veturin. Hann var í Íslandi ár um ár inntil 1965.

Síðan tá hevur Jákup bert róð út, og hann er framvegis á floti, tá ið høvi bíðst. Hann hevur tískil verið 69 ár á sjónum og hevur roynt eitt sindur av hvørjum. Jacob kann sigast at vera ein rættuligur knassi. Hann er enn sera birgur, og tað er ikki smávegis, hann kann fortelja frá. Hann hevur róð nógv út einsamallur. Hann hevur eisini verið einsamallur úti á Føroya Banka. Hann kennir hvønn plink og hvørt mið og hevur sera gott innlit í streymviðurskifti. Vónandi fer tað at eydnast at fáa hansara vitan fest á pappír, áðrenn tað er ov seint.

Jacob giftist við Hansu f. Weihe, eisini úr Porkeri. Hon er deyð fyri nøkrum árum síðani. Tey áttu børnini Donna, John, Heri, Hennvá. Donna, sum búði niðri, og John eru farin. Heri er giftur við Marjun f. Nygaard, og tey búgva í Porkeri. Hann er útróðrarmaður eins og pápin og abbin. Hennvá er gift við Finnboga Danielsen, og tey búgva á Tvøroyri. Abbabørnini eru seks í tali. Jacob er eisini blivin langabbi.

Jacob hevur havt ein sera stóran áhuga fyri fiskiskapi. Men hann hevur eisini luttikið í øllum vanligum bygdalívi. Hann hevur seyð, sum hann framvegis passar.

Jacob er virkin í missiónshúsinum í Porkeri og hevur eisini orðið tá ið høvi býðst.

Jacob átti tríggjar systrar. Ein var Emanda, sum búði í Porkeri, men sum doyði fyri nøkrum árum síðani.

Hinar báðar eru Maja, sum býr í Danmark og Jenny, sum býr í Lopra. Hon verður annars 65 ár sama dag, sum Jacob hevur sín føðingardag.

Ynskt verður Jacob og hansara hjartaliga tilukku við teimum 85 árunum.

**ó.**



# VIÐMERKINGAR

## Útbrend - ella manglar okkum bara viðurkenning?

**TÓRA VIÐ KELDU**
hjarta@kallnet.fo



Vit eru sum kør, sum skulu fyllast við móti. Um tað ikki verður fylt á, standa vit einsamøll og fáa eina kenslu av at vera virðisleys, tóm ella útbrend.

Hóast einki einvíst svar kunnu vit væl spyrja, hvat í lívinum hevur størst ávirkan á persónsmensku okkara, og hvat ger okkum til serstakt menniskja, vit í veruleikanum eru. Øll eru serstøk. Hetta er ein almenn grundleggjandi áskoðan øll í framkomna heiminum eiga at hava. Spurningurin er bara, um vit duga at síggja hetta í hvørjum øðrum og í okkum sjálvum - og við hesum læra at síggja stórt í frælsa lívinum, og alskyns møguleikunum, sum liggja í og uttan um okkum.

Strongd, og fólk, sum kenna seg útbrend, eru kend evni í samfelagskjakinum. Samfelagið krevur nógv av okkum og avleiðingin er sjálvsagt, at vit mugu krevja nógv av okkum sjálvum. Tað er tó eyðsýnt, at tað eru fleiri og fleiri, sum júst av hesi orsøk gerast strongd og kenna seg útbrend og megna ikki vísiliga at liva gerandisdagin. Hetta gerst við tíðini ein samfelagstrupulleiki, tí samfelagið fær ikki sum mest burtur úr serstaka, skapandi og mennandi borgarunum.

Í bókini "Du har rørt ved mit hjerte" koma Møllehave og Pettersson í samrøðu inn á júst hetta evnið - at vera útbrend. Pettersson vil vera við, at orka er sjálvskapt. Meir vit arbeiða, meir viðurkenning fáa vit og hetta virkar til økta orku. Um vit arbeiða nógv í einum spennandi viðurkennandi umhvørvi, sum vit trívast í, kunnu vit møtast, men verða ikki útbrend. Tí er hann rættiliga ivingarsamur, tá ið tosað verður um, at fólk eru útbrend. Heldur enn at vit onga orku hava eftir í okkum, eru tað frustratiónir og mótloysi, sum skapa hesa kenslu, heldur Pettersson. Okkum mangla neyðugu viðurkenningina fyri tað vit gera. Um vit bara oysa av okkara egnu orku, uttan tó onkursvegna at fáa hana aftur - kanska við gevandi viðurkenning - , kennist tað, sum um vit brenna út.

Trupulleikin gerst eisini størri, um vit ikki kenna okkum at taka lut í felagsskapinum ella umhvørvinum ella ikki eru vís í okkara egna leikluti. Hetta er jú avgerandi fyri neyðugu persónligu viðurkenningina.

Og eg siti bara og nikki. Hetta kenni eg alt aftur og eg eri vís í, at hetta kenna øll. Hetta er menniskjaligt. Vit eru sosialar verur, sum skulu vera virkin, áhugað, eldhugað og hava á somu tíð brúk fyri onkrum slagi av felagsskapi, viðurkenning og móti til tess at fáa at eitt gott og spennandi lív, sum á ein ella annan hátt gevur meining.

Hugsast kann, at vit mugu skapa eitt mennandi arbeiðsumhvørvi, sum gevur viðurkenning og fær tað serstaka í hvørjum einstøkum at blóma. At kenna okkara pláss og síggja stórt í hvørjum øðrum, vísa áhuga, geva uppiborið rós - eins og rís eisini er neyðugt, um vit skulu mennast og koma víðari - kenna okkara styrkir og avmarkingar, og krevja eina greiða, ítøkiliga og miðvísa arbeiðsætlan. Hetta er krevjandi, men avgerandi krøv, um vit sum samfelag skulu fáa mest burtur úr persónliga potentialinum.

Vit eru sum kør, sum skulu fyllast við móti. Um tað ikki verður fylt á, standa vit einsamøll og fáa eina kenslu av at vera virðisleys, tóm ella útbrend - heldur enn brennandi og mennandi.

*www.myspace.com/toravidkeldu*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hagbard Dalfoss**, ættaður úr Froðba, búsitandi í Havn, andaðist á landssjúkrahúsinummánadagin, 72 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin klokkan 18.. Jarðarferðin verður úr havnar kirkju fríggjadagin klokkan 13. Sálmabókin verður nýtt. Tey, sum vilja minnast Hagbard, kunnu lata Føroya Felag Móti Krabbameini eina gávu, konto í peningastovnunum.

**Lisa Sivertsen** á Viðareiði, fødd Fuglø, andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi, mánadagin 11. august, 64 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi norður til Viðareiðis mikudagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Viðareiðis kirkju hósdagin klokkan 13.30.

**Snorri Paturson**, Tórshavn, andaðist sunnudagin 84 ára gamal. Bønarhald verður á Lágargarði mikudagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin klokkan 13. Tey ið ynskja at minnast Snorra kunnu lata Lágargarði eina gávu. Konta í peningastovnunum.

**Sylvia Hansen**, fødd Olsen, ættað av Húsum, búsitandi í Havn andaðist á Landssjúkrahúsinum mánamorgunin 11. august, 86 ára gomul.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Hagbard Dalfoss**

andaðist á Landssjúkrahúsinum
mánadagin 11.08.08, 72 ára gamal.

Farið verður úr landssjúkrahúskapellinum
hóskvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
fríggjadagin kl. 13.00. Sálmabókin verður nýtt.

*Familjunnar vegna*
**Sonja, Oda, Alexander og Ann við familjum**

Tey, ið vilja minnast Hagbard v/ kransi ella blómum, kunnu lata eina peningagávu til Føroya felag móti krabbameini

# Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Anna Maria (Mia) Johannesen**
**Skála**

doyði og varð jarðað.
Tøkk til Bøgesvang, prest, fyri góð orð.
Tøkk til kikrjutænarar, sangarar, berarar og gravarar,
tøkk fyri blómur, kransar og gávur til kirkjuna,
og tøkk fyri alla hjálp í sambandi við ervið.
Ein serstøk tøkk til heimahjálpirnar og til
Ellis- og røktarheimið í Runavík.

*Fyri tey avvarðandi*
**Sonja og Petur Jacop**

## Dagurin

**14. august. Eusebius.** Fleiri halgimenni at navni Eusebius eru knýtt at degnum 14. august.